

# KT-varðafelagið 10 ár

**Fyri 10 árum síðani varð felag stovnað at samskipa og betra umstøðurnar hjá KT-vørðum í fólkaskúlanum**

UNDIRVÍSING

Mikudagin, 6. januar 2010, er stórur dagur fyri KT-vørðir í fólkaskúlanum. Tá verður møguleiki at taka samanum og meta støðuna »KT í fólkaskúlanum«, nú 10 ár eru liðin, síðani felagið varð stovnað.

- Samstundis seta vit sjálvsagt út í kortið ætlanir og ynski frameftir, ið hava til endamáls at menna KT í fólkaskúlanum, sigur KT-varðafelagið í tíðindaskrivi.

KT-varðafelagið er undirfelag til Føroya Lærarafelag og hevur til endamáls at betra umstøðurnar fyri KT-vørðirnar, men hetta verður altíð við tí í huga, at tá ið KT-vørðurin hevur góðar arbeiðsumstøður, verður tað til frama fyri bæði næmingar og lærarar í fólkaskúlanum. Skulu næmingar og lærarar hava møguleika at taka KT inn, har tað er natúrligt í gerandisdegnum, so skulu KT-vørðir standa klárir, soleiðis at tøknin riggar, og at nýtari hevur førleika at gagnnýta útgerðina.

Nógv orka hevur seinastu árini verið løgd í at skipa arbeiðsviðurskiftini og í smáum at menna KT-vørðirnar. Hetta hevur ávíkavist verið við at lata Føroya Lærarafelag væl gjøgnumarbeidda arbeiðslýsing og síðani eisini at skipa fyri tiltøkum og vistarskeiðum fyri KT-vørðir.

**Nakað av tí, felagið hevur fyri framman er,**

- at fáa arbeiðslýsingina setta í verk, so skipað viðurskifti eru á økinum
- at skumpa undir útbúgving og skeið, so KT-vørðir eru dagførdir
- at skipa samstarvið, soleiðis at KT-vørðir seta sítt fingramerki á skúladagin.

Alneyðugt er, at KT-vørðir hava greið og skipað arbeiðsviðurskifti, soleiðis at møguleiki er at hugsavna seg og menna seg í teimum avbjóðingum, leggjast skulu fyri næmingar og lærarar. Til hetta er sjálvsagt neyðugt við útbúgving og skeiðum - og í øllum hesum er sjálvagdur lutur, at tað eru KT-vørðirnir í fólkaskúlanum, ið eru við til at seta orð á tørvin og krøvini.

Í samband við 10-ára dagin verður felagsløta - fyri KT-vørðirnar - í húsum Føroya Lærarafelags, og síðani verður vitjað hjá ymsum KT-fyritøkum.

- Bestu ynski um gott nýggjár og góðar KT-avbjóðingar í føroyska fólkaskúlanum, sigur Jákup av Skarði í KT-varðafelagnum í tíðindaskrivi.

# Ólafur Ragnar sigur nei



Íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, vil ikki staðfesta lógina um, at íslendska ríkið skal veðhalda fyri skuldbindingar hjá Icesave-bankanum. Forsetin boðaði frá avgerð síni í morgun.

Avgerðin hjá forsetanum merkir, at spurningurin um Icesave-málið skal til fólkaatkvøðu.

- Við hesum fær tjóðin valdið og ábyrgdina í sínar hendur, stendur í fráboðanini frá forsetanum.



# Syngið við kvøld í Kollafirði

Skipað verður fyri »syngið við kvøldi« í missiónshúsinum í Kollafirði leygarkvøldið 9. januar kl 19.30. Kvøldið verður skipað soleiðis, at ymisk koma at luttaka við sangi og so verður eisini felagssangur.

- Vit sita við smærri borð og njóta ein kaffi/themunn við køkum, siga fyrireikararnir.

**Hesi luttaka við sangi:**
Magda og Mai-Britt úr Eysturoy
Kvinnur úr Sion , Kollafjørð.
Gudny Magnussen , Kollafjørð
Irena Jacobsen, Hvalvík
Mirian og Kristoffur , Kollafjørð.

Fyrireikararnir heilsa og siga, at øll eru hjartaliga vællkomin at verða við til hettar sangkvøldið.


## Internetsamskipari til Smyril Line

WWW.
SMYRIL-
LINE
.KOM!



Vilt tú vera við at marknaðarføra Smyril Line á netinum og at samskifta online við málbólkin hjá okkum í Føroyum, Danmark, Týsklandi og aðrastaðni í Evropa, so hava vit eitt sera spennandi starv til tín.

Vit leita eftir einum starvsfólki, sum skilir týdningin av online-samskifti, og sum kann gera Smyril Line sjónligt fyri umheiminum á internetinum. Vit leita eftir einum starvsfólki, sum hevur dirvi og vilja, og sum skilir týdningin av online-marknaðarføring.

Vit bjóða tær eitt spennandi fulltíðarstarv í einari vaksandi fyritøku, sum heldur til í Tórshavn, Keypmannahavn, Hanstolm og Kiel.

Størsta ábyrgdarøkið verður at samskipa samskiftið á netinum, syrgja fyri at Smyril Line verður sjónligt, har tað er neyðugt, millum annað á Google og øðrum leitimaskinum, skriva tekstir, viðlíkahalda heimasíður og annað.

**HØVUÐSUPPGÁVUR:**
– Styrkja Smyril Line á online-økinum
– Samskipa aktivitetir í sambandi við dagføringar o.a. á heimasíðunum
– Skriva tíðindi til heimasíðurnar
– Dagføra tekstir og myndir
– Syrgja fyri, at øll produkt eru at finna
– Syrgja fyri, at alt sær gott út
– Supportera allar skrivstovur á samskiftisøkinum

**VIT VÆNTA, AT TÚ:**
– Arbeiðir skipað og sjálvstøðugt
– Hevur royndir á økinum
– Hevur viðkomandi útbúgving
– Dugir væl at samskifta við starvsfelagaðar og onnur
– Dugir at orða teg í minsta lagi á føroyskum, donskum og enskum, bæði í skrift og talu
– Hevur roynd við CMS-skipanum

*Hevur tú spurningar um starvið, ert tú altíð vælkomin at seta teg í samband við marknaðarstjóran, Henny á Líknargøtu, á +298 551511 ella á henny@smyril-line.fo.*

*Starvið skal setast skjótast til ber, so um hetta hevur tín áhuga, verður tú vinarliga biðin um sum skjótast at senda okkum tína umsókn við teldubrævi til henny@smyril-line.fo ella við vanligum brævi til:*

Smyril Line
Yviri við Strond 1
Postboks 370
FO 110 Tórshavn

SMYRIL LINE EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

SENDISTOVAN